# Ábyrgdarloysi

**Fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin, Karsten Hansen, kallar fíggjarpolitikkin hjá ABC-samgonguni fyri ábyrgdarleysan. –Vit eru ikki komin í nakra veruliga mótgongd enn, sum minnir um eina kreppu, og tí er tað ikki ábyrgdarfult, at samgongan aftur ætlar at hava hall á fíggjarlógini, sigur Karsten Hansen.**

FÍGGJARLÓGIN 2005

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Virkin fíggjarpolitikkur. Hall á slakar 200 mió. krónur. Skattalætti. Fleiri íløgur í Føroyum. Hesi er millum gandaorðini hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Bárði Nielsen, nú hann er farin undir at leggja seinastu hond á fíggjarlógaruppskotið fyri 2005.

Í Degi og viku mánakvøldið legði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum dent á, at nú samfelagshjólini eru farin at mala seinni, er tað av alstórum týdningi, at samgongan ikki táttar í búskaparliga. Við einum skattalætta og einum virknum almennum íløgupolitikki ætlar samgongan at tryggja, at arbeiði framhaldandi verður til allar hendur í landinum.

Karsten Hansen var fíggjarmálaráðharri í hálvt sætta ár, og framsøgumaður Tjóðveldisfloksins í fíggjarmálum heldur lítið um fíggjarpolitikkin hjá Bárði Nielsen og samgonguni.



*– Eg haldi ikki tað er skilagott við einum skattalætta nú, tí hetta fer at minka um inntøkurnar hjá landskassanum, og tað hongur ikki saman við, at útreiðslurnar halda á við at hækka. Eg beri eisini ótta fyri, at skattalættin í størstan mun verður nýttur til hægri forbrúk til innfluttar vørur, sigur Karsten Hansen*

*Mynd: Savnsmynd*

## Eingin kreppa

–Vit eru ikki komin í nakra veruliga mótgongd enn, sum minnir um eina kreppu, og tí er tað ikki ábyrgdarfult, at samgongan aftur ætlar at hava hall á fíggjarlógini. Spyrt tú meg, er hatta ikki ein góður fíggjarpolitikkur, sigur Karsten Hansen.

Tjóðveldistingmaðurin úr Norðoyggjum ásannar, at krepputekin eru at hóma í ali, rækju- og flakavinnuni, men hann heldur kortini ikki tað ber til at tosa um eina djúpa kreppu.

– Tað er ábyrgdarleyst at nýta pengarnar í Landsbankanum til at fíggja eitt hall á fíggjarlógini longu nú. Hasir pengarnir skulu nýtast, tá ein verulig kreppa herjar, og tað er eftir mínum tykki ikki nú, sigur Karsten Hansen.

Hann vísir á, at hóast røddir eru frammi um, at nógvir føroyingar ganga arbeiðsleysir, er hetta ikki heilt rætt.

– Hóast arbeiðsloysi er hækkað nakað seinastu mánaðirnar hava Føroyar framvegis lægsta arbeiðsloysi í Evropa. Hetta taki eg sum eitt positivt tekin, og tí er als eingin orsøk til at nýta 200-300 mió. krónur úr Landsbankanum í hesum tíðum til at fíggja eitt hall, heldur fyrrverandi landsstýrismaðurin.

## Ikki skilagott

Karsten Hansen tekur undir við sitandi landsstýrismanni, tá hesin sigur, at tað er neyðugt við einum virknum íløgupolitikki frá almennari síðu fyri at tryggja framhaldandi virksemi í landinum.

Bárður Nielsen vísti í Degi og viku á, at komandi fíggjarár verða slakar 100 mió. krónur fleiri til íløgur í Føroyum, tí Smyril er liðugur. Árliga játtanin til Smyril seinnu árini skal nú nýtast til íløgur í Føroyum, og hesum tekur Karsten Hansen fult undir við.

Kortini heldur tjóðveldistingmaðurin lítið um ætlaða skattalættan hjá samgonguni.

– Eg haldi ikki tað er skilagott við einum skattalætta nú, tí hetta fer at minka um inntøkurnar hjá landskassanum, og tað hongur ikki saman við, at útreiðslurnar halda á við at hækka. Eg beri eisini ótta fyri, at skattalættin í størstan mun verður nýttur til hægri forbrúk til innfluttar vørur, sigur Karsten Hansen.

## Óvist

Undan framløguni av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004 hjá samgonguni í vár, legði Tjóðveldisflokkurin fram sítt egna fíggjarlógaruppskot. Spurdur, um Tjóðveldisflokkurin ætlar at hava sítt egna fíggjarlógaruppskot fyri 2005, svarar framsøgumaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum í fíggjarmálum, at tað er eingin endalig støða tikin til tað enn.

Karsten Hansen sigur, at Tjóðveldisflokkurin ætlar at vísa á ábyrgdarfullar loysnir í samband við fíggjarpolitikkin.

– Vit ætla okkum ikki at yvirbjóða samgonguna, sum vanligir andstøðuflokkar plaga at gera, men vit ætla okkum at vísa á, hvat vit halda er rætt. Hetta skal millum annað gerast í fíggjarnevndini, sigur Karsten Hansen.

# Mítt Føroyar á flatlondum

Nú letur nýggj ferðaskrivstova upp í Keypmannahavn. Tann 20. september opnar My Faroe í sama bygningi, har Føroyahúsið í Keypmannahavn heldur til.

– Eg eri sera fegin um, at lívsdreymur mín um at stovna egna ferðaskrivstovu, har høvuðsdentur verður lagdur á at selja Føroyar sum ferðamál, nú er veruleiki, sigur stjórin í My Faroe, Therese Turidardóttir Kreutzmann.

– Hetta samarbeiðið tryggjar, at vit kunnu bjóða pakkaferðir til danska marknaðin, har góðskan altíð er í hásæti. Eg eri eisini samførd um, at við øllum tí Føroyar og føroyingar hava at bjóða, kunnu vit røkka enn fleiri, enn vit gera í dag. Eg meti tað eisini vera ein fyrimun fyri hetta arbeiðið, at skrivstovan er knýtt at Føroyahúsinum í Keypmannahavn, sigur Therese Turidardottir Kreutzmann.

**-hkm**

# Jógvan í bíðistøðu

**Borgarstjórin í Nólsoy, Jógvan Thomsen, hevur framvegis ikki tikið støðu um hann stillar upp til kommunuvalið í november. Borgarstjórin í Kirkjubøar kommunu, Anfinn Brekkstein stillar upp fyri Sambandsflokkin**

BÝRÁÐSVAL

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Kommunusamanleggingarnar kring landið fara at seta sín serliga dám á kommunuvalið seinni í heyst. Í miðstaðarøkinum skulu fólk úr Nólsoy, Hesti, Velbastað og Kirkjubø fyri fyrstu ferð velja í Tórshavnar kommunu.



*– Eg haldi, at eg næstan havi fingið áheitanir úr øllum flokkum og tað er tað er bara stuttligt, men eg havi ikki tikið støðu um eg fari at stilla upp*

Hjá flestu veljarum verður kommunuvalið fyrsta smakkiroyndin av einum floksbýttum kommunuvali.

Í Nólsoy, Hesti, Velbastað og Kirkjubø er óivað spenningur um, hvørjir bygdaráðslimir ætla at royna seg í valstríðnum í heyst, og ikki minst hvørjar flokkar hesi ætla at umboða.

## Nógv tilboð

– Eg haldi, at eg næstan havi fingið áheitanir úr øllum flokkum og tað er tað er bara stuttligt, men eg havi ikki tikið støðu um eg fari at stilla upp.

Borgarstjórin í Nólsoy seinastu fýra árini, Jógvan Thomsen, hevur framvegis ikki gjørt av um hann verður millum valevnini til kommunuvalið í november. Hann ætlar sær at taka støðu í næstum.

## Brekkstein stillar upp

Síðan 1992 hevur borgarstjórin í Kirkjubøar kommunu, Annfinn Brekkstein, sitið í kommuni. Á tveimum teimum seinastu løgtingsvalunum hevur Annfinn verið uppstillaður fyri Sambandsflokkin í Suðurstreymi, og borgarstjórin í Kirkjubøar kommunu ætlar sær eisini at tørna út fyri Sambandsflokkin á kommunuvalinum í heyst.

Vit royndu fyrrapartin at fáa fatur á borgarstjóranum í Hesti, Eyðfinni Lenvig, men tað eydnaðist okkum ikki, og tí vita vit av góðum grundum ikki um hann ætlar at stilla upp til kommunuvalið.



# Útróðrarmenn argast um gágguveiði

**- Sjálvandi skulu vit royna at fáa mest møguligt burtur úr tí tilfeingi, sum livir í havinum kring Føroyar, men tað kann ikki vera rætt, at útróðrarmenn skulu troðkast burtur av vanligari fiskileið til frama fyri nýggjar veiðihættir, heldur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, sum hevur sett Bjørn Kalsø, landsstýrismanni, fyrispurning**

GÁGGUVEIÐA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Útróðrarmenn siga, at vandin fyri at missa reiðskap er stórur, um línan kemur niður, har stórt tal av gággurúsum standa, sigur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, hevur sett Bjørn Kalsø, landsstýrismann í fiskivinnumálum, skrivligan fyrispurning um vinnuliga gágguveiði, sum nú fer fram undir Føroyum.

Í fyrispurninginum sigur løgtingsmaðurin ikki, hvat skip talan er um, sum nú er á gágguveiði. Skipið er bert tað eina, og tað er nevniliga Bergunn, fyrrverandi Skansatanga, sum í fjør summar royndi eftir krabba undir Føroyum.

## Fleiri spurningar

Løgtingsmaðurin vísir á, at útróðrarmenn hava trupult við at fáa línurnar niður á vanligari línuleið, tí "skip hevur hegnað stórt øki av við hundraðtals gággurúsum…", sum hann tekur til.

Kári vil tí í fyrsta lagi hava landsstýrismannin at greiða frá, hvussu nógv loyvir eru givin til veiði eftir gággu við glúpi ella rúsum.

Hann spyr, um hetta eru tíðaravmarkaði royndarloyvir, og um nakrar avmarkingar eru í talinum av rúsum.

Løgtingsmaðurin vil eisini hava at vita, um nakrar avmarkingar eru sum siga, hvar reiðskapurin kann setast.

At enda spyr hann, hvønn framtíðarpolitikk landsstýrismaðurin hevur á hesum øki.

## Trupult á somu leið

Løgtingsmaður Sjálvstýrisfloksins heldur, at sjálvandi eiga vit at fáa mest møguligt burtur úr tí tilfeingi, sum livir í havinum kring Føroyar – á burðardyggan hátt.

– Tó vita øll, sum kenna nakað til fiskivinnu, at tað kann vera trupult at royna við ymiskum fiskireiðskapi á sama øki.

Kári vísir á, at ein ávís roynd hevur verið eystanfyri, har skip í nógv ár (Norðheim, blaðm.) hevur dreggjað eftir skeljum.

– Hetta hevur borið til, tí talan hevur bert verið um tað eina skipið, sum eisini hevur sýnt fyrilit, samstundis sum gott samskifti hevur verið millum partarnar, ið hava roynt á hesum leiðum.

## Útróðrarmenn misnøgdir

Kári P. Højgaard sigur, at útróðrarmenn eru misnøgdir við, at skip, sum eru ræðisavmarkaði, hava lagt um til at veiða við rúsum á landleiðini.

– Útróðrarmenn siga, at vandin fyri at missa reiðskap er stórur, um línan kemur niður, har stórt tal av rúsum standa.

Løgtingsmaðurin heldur tað ikki vera rætt, at útróðrarmenn skulu troðkast burtur av vanligari fiskileið til frama fyri nýggjar veiðihættir.

Fyrispurningurin hjá Kára P. Højgaard er dagfestur, 30. august, og á tingfundi í gjár skuldi løgtingið atkvøða um, hvørt hann skal svarast ella ikki.

Sosialurin fer at venda aftur til málið um vinnuliga gágguveiði, tá ið Bjørn Kalsø væntandi hevur svarað fyrispurninginum.



*Bergunn, fyrrverandi Skansatangi, fiskar gággur við rúsum undir Føroyum. Í fjør summar var skipið á krabbaveiði. Krabbin varð virkaður í Álakeri í Havn, har eini 8 fólk høvdu arbeiði í vertíðini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Nýggj Støkk-høll í Runavík

**Runavíkar býráð hevur í prinsippinum givið fimleikarfelagnum Støkk byggiloyvi til eina nýggja høll sunnanfyri verandi ítróttarhøll í Runavík**

NÝGGJ HØLL

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, sigur, at kommunan hevur sæð eitt skitsuprojekt av høllini, sum sær ógvuliga áhugavert út, og væntandi fer at kosta nakrar miljónir krónur at byggja.

Hann sigur, at talan er um eina spennandi byggiætlan, sum verður í eini kombinatión, sum hann tekur til, við verandi ítróttarhøll.

– Vit hava gjørt eina avtalu um møguliga at yvirtaka verandi høll, sum fimleikarfelagið eigur á Glyvrum.

Hvat kommunan kann brúka høllina til, um ætlanin at keypa hana gerst veruleiki, sigur Rodmundur, at tað hevur býráðið ikki tikið støðu til enn.

– Hetta liggur helst eitt sindur frammi í tíðini, sum hann tekur til.

Rodmundur vísir á, at hóast gamla Støkk-høllin er gomul og krevur ábøtur, er hetta hóast alt ein bygningur, sum hevur nakað av virði.

– Nú fara vit líka sum at lata Støkk fóta sær fyrst og soleiðis finna út av, hvussu ein tíðarætlan kemur at síggja út. Tað er greitt, at hetta er ein stór ætlan, sum krevur tíð, orku og fígging.

Borgarstjórin vísir á, at við at keypa gomlu Støkkhøllina, kann Runavíkar kommuna samstundis hjálpa felagnum, sum ger eitt ógvuliga gott arbeiði, í gongd við sínar ætlanir, soleiðis felagið í framtíðini fær betri umstøður at virka undir.

# Stokkastovan letur uppaftur



*Alt bendir nú á, at Stokkastovan í Saltangará letur uppaftur við matstovuvirksemi og skeinking. Á fundi í gjár skuldi Runavíkar býráð taka støðu til eina umsókn um skeinking aftur við mati*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Síðan John's Restaurant læt aftur fyrr í ár, hevur einki aktivt skeinkiloyvi verið í Runavíkar kommunu - og nú Runa-víkar Sjómansheim læt aftur herfyri, hevur heldur eingin matstova verið í kommununi, sum er hin triðstørsta í landinum**

MATSTOVUVIRKSEMI

*Vimund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú er tó vón fyri framman, bæði við matstovu og skeinking afturvið mati.

Á býráðsfundi í gjár skuldi Runavíkar býráð taka støðu til eina umsókn um skeinkiloyvi í Stokkastovuni í Saltangará, sum seinastu árini hevur verið karmur um John's Resturant.

Uppgávan hjá býráðnum í slíkum føri er at gera sítt ummæli av umsóknini, og síðan er tað Loyvisnevndin, sum eigur avgerðina, um loyvi skal gevast ella ikki.

## Harmast og fegnast

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, vildi týsdagin ikki upplýsa, hvør hevur søkt um hetta loyvi, men hann segði seg fegnast um, at býráðið nú enn einaferð sleppur at taka støðu í einum slíkum máli. Samstundis segði hann seg harmast um, at alt matstovuvirksemi í kommununi liggur lamið í løtuni.

– Eg haldi, at teir, sum nú hava søkt um skeinkiloyvi til matstovuvirksemi í Stokkastovuni, eru áhugaverdir persónar, sum hava hegni til at skapa røttu karmarnar um virksemið, sum ætlandi verður har.

Borgarstjórin sigur, at býráðið fyrr í summar viðgjørdi eina aðra umsókn um skeinkiloyvi í Stokkastovuni.

– Vit vóru eisini positivir fyri hesi umsókn, men hon náddi ikki undir land, tí stigtakarin slepti ætlanini.

Rodmundur sigur, at hann í spenningi bíðar eftir, at gongd aftur kemur á matstovuvirksemi í kommununi.

## Fara til Havnar

Tað var John Arne Nilsestuen, sum átti og rak John's Resturant, sum læt aftur 26. Apríl í ár.

Tá ið hann læt aftur, segði John Arne við Sosialin, at talið av vitjandi hevði verið minkandi gjøgnum veturin, og serliga síðan Runavíkar býráð avgjørdi ikki at geva Kenneth Rasmussen dansi- og skeinkiloyvi í kommununi, kom rættiligur stígur í.

– Tað virkaði, sum um fólk fóru í protest og vildu heldur ikki vitja okkum, tá ið avgerðin í býráðnum fyrilá.

John Arne vísti á, at fólk tosa um, at einki er í kommununi, men ein trupulleiki er, at nógv heldur velja at fara til Havnar at fáa sær ein bita enn at seta seg niður her í økinum. Hví so er, dugi hann ikki at siga.

## Fyrimyndarligt

Rodmundur Nielsen sigur, at John Arne Nilsestuen røkti sítt skeinkiloyvi í Stokkastovuni fyrimyndarligt, og kommunan hevði ongar sum helst trupulleikar av hesum virksemi.

– Gongur alt, sum ætlað, vænti eg, at nýggja matstovan í Stokkastovuni letur upp seinni í heyst, sigur borgarstjórin.